

*Hans Andrias Sølvará fekk ársins kjakvirðisløn, Ingeborg Vinther gjørdist ársins kvinna og Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen gjørdust árins menn*

*Myndir Jens Kristian Vang*

# Ingeborg Vinther ársins kvinna

**Grundgevingin hjá dómsnevndini at velja Ingeborg Vinther til ársins kvinnuliga føroying:**

Avgerðin um at Ingeborg Vinther skal fáa heiðurin at vera Ársins kvinna hesuferð man vera tann skjótasta og lættasta man vera hin skjótasta og lættasta avgerð, eg havi verið við til at taka. Hennara navn peikaði á seg sjálvt millum innkomnu uppskotini, og allir nevndarlimirnir vístu á hana, næstan áðrenn teir vórðu spurdir.

Eg hugsi heldur ikki, at tað skuldi verið neyðugt at grundgeva fyri almenninginum, at hettaa er tann rætta avgerðin.

Í meira enn tríati ár hevur Ingeborg Vinther havt ein leiðandi leiklut í føroysku samfelagsgongdini. Hon hevur sjálv sett dagsskránna og hon hevur sjálv stýrt gongdini tann vegin hon hevur viljað. Ikki fyri sína egnu skyld, tí hon hevði ivaleyst kunnað gjørt so mangt annað í lívinum, men vegna tey, ið hon fyri so mongum árum síðani átók sær at standa á odda fyri og verja: Arbeiðarastættina og løntakararnar í síni heild, og serstakliga tey lágløntu.

Ingeborg Vinther gjørdist forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í 1980 og síðani er hon afturvald 12 ferðir uttan so mikið sum at hava havt eitt tað einasta mótvalevni nakrantíð. Tað verður sagt um hana, at tað merkti eitt skifti í fakfelagspolitikkinum hjá Føroya Arbeiðarafelag, at hon tók við sum formaður. Frammanundan vórðu nýggjar sáttmálar fingnir í lag uttan stórvegis hóvasták ella verkfall, men Ingeborg var meira braneggjað og stýrdi við harðari hond. Ja, soleiðis stendur um hana í einum blað, og vit, ið bert eru áskoðarar til alt tað, ið fer fram í fakfelagsarbeiði, við lønarsamráðingar, undir verkføllum og í øllum øðrum, ið hevur fylt dagarnar hjá Ingeborg, vit hava helst ta fatan, at hon man ikki vera mjúk at strúka.

Eg veit ikki hetta, men eg kundi hugsað mær, at Ingeborg onkuntíð, tá harðast hevur leikað á, hevur hoyrt slík orð sum groggj og illriski ella onnur orð av sama niðrandi slag, ið javnan verða nýtt um kvinnur, ið átaka sær leiklutir, sum tann Ingeborg hevur. Men millum limirnar í felagnum hevur eingin ivi verið, tí øll hesi árini, hon hevur verið formaður, hevur ongin stillað upp ímóti henni, tá formansval hevur verið. Ingeborg hevur víst aðrar síður eisini, og man oftari hava fingið síni úrslit við góðum samráðingarevnum, góðum leiðsluhátti og smidligari framferð. Tað er bara tað, at hon hevur megina at standa við sítt og halda fast um tað rætta, tá tað krevst og er neyðugt.

Javnstøða hevur eisini upptikið Ingeborg. Sjálvsagt, tí millum hennara limir í Føroya Arbeiðarafelag eru eisini teir størstu láglønarbólkarnir, harímillum tær tímaløntu og ófaklærdu kvinnurnar.

Líka løn fyri sama arbeiði var fyrsta arveiðsuppgávan hjá Ingeborg sum fakfelagskvinnu. Í 1977 leiddi Ingeborg lønarsamráðingar fyrstu ferð. Tá fingu mannfólk hægri tímaløn enn kvinnur. Samráðingarnar endaðu við, at eftir fýra árum skuldu konufólk fáa somu løn sum mannfólk. Hetta var ein sigur, men stríðið er ikki av, tí enn hava mannfólk væl hægri inntøku enn menn. Hetta veit Ingeborg.

Hon hevur eisini verið uppi í politikki, og var ein av fakfelagsleiðarunum, sum stillaðu upp fyri Verkamannafylkingina í 1994 fyri at tala arbeiðaranna søk á tingi í einum tí truplastu tíðarskeiði, vit hava havt í landinum í okkara tíð. Hon varð vald fyri Suðuroynna, og var í tinginum í 4 ár. Tó man hon hava hildið, at hon gjørdi betri gagn uttanfyri, og stillaði ikki uppaftur.

Eitt mál sum mannarættindi hevur eisini hennara áhuga, og hennara klára rødd hoyrist tíðiliga í orðaskiftinum.



*Løgmaður handar Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag, heiðursbræv í samband við kjósanina av henni sum ársins kvinnu*

Tað skal skarpur lútur til skurvut høvd, verður sagt, og hetta noyðist hon at tola, ið vil fram í taka ræði í eini mansstýrdari verð. Her hevur Ingeborg gingið undan og víst øðrum kvinnum á tann einfalda veruleika, at spurningurin um javnstøðu er ein spurningur um makt, og at makt er ikki nakað ein fær í gávu. Eingin við makt letur hana sjálvboðin frá sær. Vilt tú javnstøðu, mást tú vilja makt, og vilt tú hava makt, mást tú taka hana.

Tá eg setti hesi orðini saman rann mær ein kendur amerikanskur poppsangur í huga, ið eg hugsi Ingeborg sjálv hevði kunnað sagt um sítt virki. Hon setir dám á, har hon er og tí hugsi eg um Frank Sinatra, ið singur:

I did it my way!

Eg geri tað á mín hátt!

Tí fært tú henda heiðurin.

## Takkarrøðan hjá Ingeborg Vinther

Fari fyrst og fremst at takka fyri heiðurin at verða vald til ársins kvinnu. Tað er ein stór æra.

Tað var ikki nakað, sum kom mær til hugs, tá eg fyri skjótt 28 árum síðani bleiv formaður fyri Føroya Arbeiðarafelag, og mátti út í tað stríð tað tá var at vera kvinna í einum mansdomineraðum samfelag. Tað var ikki altíð so lætt.

At gerast ársins kvinna 28 ár seinni má eg siga er ein veldugur heiður, sum eg takki hjartaliga fyri.

Tað er mær ein stór gleði nú eg síggi so nógvar kvinnur eru valdar á ting og eru komnar í landsstýri, og tær storma fram sum stjórar ymsastaðni í samfelagnum. Tað fær meg eisini at hugsa, at tað, sum man hevur stríðst fyri og gingið á odda fyri, ikki hecvur verið til fánýtis. Tí tað hevur víst tað og kanska fingið aðrar kvinnur at hugsa um, at okur kvinnur duga, okur kunna, bara okur vilja.

Eg fari enn einaferð at takka fyri hendan stóra heiður, takk fyri.